# Møguliga gamal oljuleki

**Leygardagin varð Sløkkiliðið boðsent, tí ramur oljuroykur var á Havnarvág. Sosialurin hevði leygardagin eina grein um nýggju tilbúgvingarætlanina viðvíkjandi oljudálking. Hetta var so fyrsta royndin við nýggju tilbúgvingarætlanini, og sagt verður av Brandstøðini, at henda ætlanin riggaði heilt væl**

OLJUDÁLKING
*Ingrid Bjarnastein*

– Nýggja tilbúgvingarætlanin riggaði væl, sigur vakthavandi á Brandstøðini í síðstu viku, Hans David Hansen.

– Tá vit fáa fráboðan um oljudálking, er okkara uppgáva fyrst og fremst at finna fram til lekan, og síðani gera tað vit kunnu fyri at steðga lekanum. Ongir trupulleikar vóru við nýggju tilbúgvingarætlanini, og tí gekk alt væl.

Hvar oljan kemur frá hevur tó ikki eydnast at finna útav enn. Í fyrstuni varð hildið, at oljan møguliga kom frá Ljósafellið ella flakanum hjá J&K Petersen, men so var ikki.

– Oljan var aftanfyri skipið, og tað var heldur onki, sum bendi á, at oljan stavaði haðani frá. Flakin hjá J&K Petersen varð lyftur upp, og har var heldur ongin leki. Møguliga kemur oljan frá Sandá, men tað er ikki vist, tí tað er ringt at gera av í myrkri. Tó kann tað eisini væl vera, at hetta er ein gamal leki, sum kemur undan kavi. Oljan kann hava ligið undir sjónum í eina tíð, og leygardagin regnaði tað illa, og so flotnar hon uppaftur, greiðir Hans David Hansen frá.



*Grundin til oljulekan leygardagin er ikki greið enn, men staðfest er, at tað eru hvørki Ljósafellið ella flakin hjá J&K Petersen, sum er orsøkin*

*Mynd: Eirikur*

## Væl nøgdur

Schuman Hjaltalin, formaður í Heilsu- og umhvørvisnevndini í Tórshavnar Býráð, er eisini væl nøgdur við mannagongdina.

– Tilbúgvingarætlanin riggaði fínt, sigur Schuman Hjaltalin. – Klokkan 12.56 ringdi Tórshavnar Havn og boðaði frá og klokkan 13.00 fór vakthavandi at kanna málið nærri. Klokkan 13.20 fór báturin á sjógv fyri at kanna, hvaðani lekin kom frá. Ein 80 m lang "pylsa", sum tað verður kallað, varð løgd á sjógv. Henda pylsa samlar oljuna, og samstundis drekkur hon olju í seg.

Týdningarmikið er at fáa staðfest, at tað var hvørki Ljósafellið ella J&K Petersen, sum høvdu nakað við lekan at gera. Nú verður farið í holt við at kanna fram við landi, at vita um lekin møguliga kemur frá kloakkum.

Tamarhald er á støðuni, og nú vantar bert at finna útav, hvaðani lekin kemur frá. Hildið verður, at talan er um brenniolju.

– Men tilbúgvingarætlanin gekk frálíkt, men sjálvandi eru onkrar smábroytingar, sum skulu gerast, sigur Schuman Hjaltalin.

– Annars viðvíkjandi fráboðan, viðgerð og so framvegis, gevi eg teimum eitt Ug+, sigur Schuman Hjaltalin at enda.



*Óvist er, hvaðani oljulekin stavar. Fyrst varð hildið, at oljan stavaði annaðhvørt frá Ljósafelli ella flakanum hjá J & K Petersen, men so var ikki*






Brøður mistu bátin:

# – Vit eru glaðir um at vera á lívi



*Brøðurnir Petur Henry og Jack Mohr vóru við línubátinum »Sjóberanum« leygardagin, tá hann sakk*

**– Vit vóru júst komin umborð á Brimil, tá báturin fór til botns við øllum, sum var umborð, sigur 27 ára gamli Petur Henry Mohr, sum eigur Sjóberan saman við bróðrinum Jack Mohr. Leygardagin um middagsleitið sakk línubáturin Sjóberin. Trý fólk vóru við, og tey sluppu øll við lívinum**

VANLUKKA
*Stefan í Skorini*

Klokkan var farin nakað av tólv leygardagin, tá Sjóberin var á veg til lands eftir ein væl eydnaðan túr eystanfyri. Umborð vóru brøðurnir Petur Henry Mohr, ið er 27 ára gamal, og Jack Mohr, ið er 25 ára gamal. Umframt teir báðar var gentan hjá Jack, ið eitur Sunneva Lamhauge, eisini við.

Hon er ofta við til útróðrar um vikuskiftini, men annars gongur hon á HF-skeiðnum á Kambsdali.

Tey høvdu fingið væl burturúr, og við sær til lands høvdu tey 4500 pund.

– Hetta var ein hampuliga góður túrur. Vit høvdu fingið 200 pund uppá stampin og høvdu verið úti í 16 tímar, tá vit fóru heimaftur, sigur Petur Henry Mohr.

Hann greiðir víðari frá, at Jack brádliga varnaðist, at nógvur sjógvur var í bátinum.

– Vit høvdu siglt í ein tíma, tá Jack fer at lensa, og hann varnast, at báturin hevur tikið nógvan sjógv inn. Hann roynir síðani at pumpa bátin tóman, men pumpurnar riggaðu ikki, sigur Petur Henry.

Tað vísti seg, at pumpurnar vóru skitnar og megnaðu tí ikki at halda tørn. Jack roynir síðani at reinsa pumpurnar, men báturin er framvegis fullur av sjógvi.

– Tá motorurin so ikki gav kølivatn, valdu vit at kalla á Tórshavn Radio og bóðu um sleip, meðan vit royndu at lensa við báðum pumpunum, sigur Petur Henry.

Men lekin hevur verið stórur, sigur hann, tí tað næsta, sum hendi, var, at motorurin stóð hálvur undir í sjógvi. Tá var einki annað at gera enn at senda neyðarkall, tí tá var støðan so álvarsom.

– Hann rak uppí ættina, og tí var tað ómetaliga óslætt á sjónum. Útvarpið hevði sagt uppí tjúgu metrar um sekundið, so tað var ordiligt illveður, sigur Petur Henry.

## Brimil var nær

Tá neyðin er størst, er hjálpin næst, verður sagt, og soleiðis var eisini í hesum førinum. Brimil var tíbetur staddur í Nólsoyarfirði og var hjá Sjóberanum umleið tjúgu minuttir seinni. Tá var Sjóberin staddur umleið tríggjar fjórðingar úr Mjóvanesi.

Saman við manningini á Brimli seta tey eina pumpu afturat umborð, men hon hjálpti lítið. Lekin hevur verið somikið stórur, at har var einki at gera.

Tað gekk ein lítil løta, so floyta teir á Brimli, og tað var tekin um, at øll skuldu fara av bátinum og í gummibátin. Sjóberin hevði nú lagt seg á liðina, greiðir Petur Henry frá.

– Tað gekk ein lítil løta, frá tí at vit fóru av bátinum, til hann sakk, sigur Petur Henry. Pumpurnar arbeiddu tó framvegis, tí um tær megnaðu at halda tørn, so kundi báturin bjargast, men har gjørdist einki.

Lekin hevur verið stórur, og tað kann vera, at teir hava siglt á okkurt, heldur Petur Henry.

Marinustøðin sigur, at fólk fóru av bátinum klokkan 12.36, og Sjóberin sakk klokkan 12.58 við øllum, sum var umborð. Bara gummibáturin, sum stóð klárur, kom uppaftur. Síðani helt Brimil inn til Runavíkar við teimum trimum fólkunum.

– Vit eru bara glað um, at vit øll sluppu av bátinum við lívinum, og at bjargingin gekk so væl, tí umstøðurnar vóru so vánaligar, sigur Petur Henry.

Hendingin hevur tó ikki tikið mótið frá brøðrunum í Saltangará. Báturin var tryggjaður, og tí fara teir so spakuliga at hyggja eftir nýggjum báti í næstum.

Brøðurnir keyptu í september Høvdan frá Borgari Justinussen úr Leirvík og nevndu hann Sjóberan. Áðrenn høvdu teir havt ein glastrevjabát, sum varð vorðin ein lítil.

# Maður læt lív í undirsjóvartunlinum



*Pumpubrunnurin er til vinstru á myndini. Hann skal taka ímóti vatni, um vanligu pumpurnar knappliga ganga fyri. Menn vóru farnir at flyta grót úr hesum brunninum, tá vanlukkan hendi*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

ARBEIÐSVANLUKKA
*Stefan í Skorini*

Júst sum liðugt varð at bora undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund, kravdi ein vanlukka í tunlinum í gjár eitt mannalív.

Mánamorgunin umleið klokkan sjey hendi tann syndarliga vanlukkan. Ein maskinførari úr Svøríki var farin úr maskinuni, tá hann varð yvirkoyrdur av einum lastbili.

NCC Vágakonsortiet sigur í tíðindaskrivi, at maðurin lat lív á staðnum.

Vanlukkan hendi í sambandi við, at útlasting av gróti úr pumpubrunninum skuldi byrja. Pumpubrunnurin er langt inni í tunlinum.

Sagt verður annars, at løgreglan og arbeiðseftirlitið kanna vanlukkuna og umstøðurnar kring hana.

## 50 bilar missa pláturnar

TRYGGING
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Havn hevur eini 50 mál um eftirstøðu liggjandi. Í næstum fara fólk av politistøðini at taka pláturnar av teimum bilum, har eigararnir ikki hava goldið tryggingargjaldið.

Talan er um gjaldið fyri ábyrgdartrygging, ið allir bileigarar skulu hava. Tá ikki verður goldið fyri hesar tryggingar, missir bilurin pláturnar.

Hesi 50 málini eru bara á Streymoynni, men roknast kann við, at hini økini eisini hava nógv slík mál.

## Fleiri mistu koyrikortið

FERÐMÁTINGAR
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Havn hevur gjørt fleiri ferðmátingar um vikuskiftið, og tað hevur eydnast teimum at fanga fleiri ferðsyndarar á vegunum.

Tilsamans eru níggju førarar tiknir fyri at koyra skjótari enn 110 kilometrar um tíman. Hesir eru tiknir í bæði bygdum og óbygdum øki. Tó eru teir flestu tiknir á landsvegnum í óbygdum øki.

Hesir kunnu allir vænta sær eina treytaða frádøming av koyrikortinum. Tað merkir, at teir skulu upp til nýggja koyri- og teoriroynd.

Tann, ið koyrdi skjótast, varð máldur at koyra 154 kilometrar um tíman. Vakthavandi vil tó ikki upplýsa, hvar hetta var.